# FSV hevur fyrirerikað seg í Íslandi

**Hóast gøtumenn eru rættuliga særdir eftir steypafinaluna, so siga teir, at lagið er gott, nú teir bíða eftir vágamonnum**

GÍ - FSV
*Jóannes Hansen*

Um FS Vágar nakrantíð skal hava nakran møguleika at gera nakað við GÍ í Gøtu, so skal tað vera nú. Gøtumenn slikka sárini eftir tapið í steypafinaluni ólavsøkudag, meðan vágamenn hava verið í Íslandi og trimma seg fyri at vera væl fyri, nú teir skulu stríðast fyri at sleppa úr botninum.

Tað er greitt, at Bartal Eliasen og Henning Jarnskor ikki vera við ímóti FSV. Eftir reyðu kortini í steypafinaluni eru teir leikbannaðir. Popczynski var ikki nóg væl fyri at vera millum teir fyrstu ellivu í steypafinaluni. Tað er rættiliga ivasamt, um hann í morgin verður komin so mikið fyri seg, at hann verður førur fyri at spæla. Símun Samuelsen var ikki førur fyri at spæla frá byrjan í finaluni, og tað er eisini ivasamt, um hann verður tað í morgin. Gidek noyddist at taka seg úr finaluni, men hann verður við í morgin.

– Vit iðra okkum um, at vit ikki avgjørdu finaluna, tá ið vit høvdu møguleikar fyri tí í 1. hálvleiki, men tað nyttar ikki at gráta yvir spilta mjólk. Nú líta vit frameftir, og lagið hevur verið gott undir venjingunum, verður sagt úr Gøtu.

Tá ið GÍ var í Miðvági, vunnu teir 2-1.

## Íslandsferðin

Hjá FS Vágum eru allir spælararnir tøkir uttan Sjúrður Ellefsen, sum hevur ein løst í arminum. Tað hevur leingi ljóðað, at FSV hevur skula fingið ein spælara úr Brasilia. Eina ferð fyrr í summar var hann komin til Portugal, men hann var sendur til hús aftur, tí pappírini vóru ikki í lagi. Hann er ikki enn komin í Vágar, og nú ivast teir í, um tað fer at spyrjast nakað burturúr hesum.



*Vágamenn hava fyrireika seg væl til seinnu hálvu. Teir hava verið á venjingarlegu í Ólafsfirði í Íslandi*

FS Vágar hevur fyri stuttum verið í eina viku í Íslandi og vant og spælt tveir dystir. Frá 16. og til 25. juli vóru teir á Ólafsfirði, har FSV venjarin, Jens Erik Rasmussen, áður hevur spælt, og har NSÍ var í fjør og fyrireikaði seg í summarsteðginum. Vágamenn lata væl at venjingunum, og teir halda seg at hava fingið væl burturúr teimum báðum dystunum. Teir taptu 3-1 ímóti Þór á Akureyri, sum er topplið í næstbestu deildini, og teir vunnu 2-1 ímóti Leftur/Dalvík.

# Tað má røkka ella støkka

**Hvørki HB ella NSÍ hava ráð at missa nakað serligt, tá ið tey bresta saman í toppuppgerðini í hesum umfarinum**

HB - NSÍ
*Jóannes Hansen*



*Hjá bæði føroyarmeistarunum úr HB og silvurvinnarunum úr NSÍ má røkka ella støkka um, tí hvørgin partur hevur ráð at tapa sunnudagin í Gundadali*

Tað eru tvey lið við stórum ætlanum og stórum vónum, og sum tykjast hava nakað at hava vón og ætlan í, sum bresta saman í Gundadali í morgin. Í fjør var HB meistari, og NSÍ, sum vann steypafinaluna ímóti HB, var næstbest. Bæði liðini ætla sær at enda ovast í ár, og í báðum feløgunum eru teir greiðir yvir, at vánirnar fyri at gera ætlanirnar til veruleika eru ikki minst tengdar at, hvussu tað fer at hilnast í morgin.

– Vit hava stóra virðing fyri HB. Men støðan er soleiðis, at vit kunnu ikki vera nøgdir, um tað ikki eydnast okkum at fáa øll trý stigini, siga teir í NSÍ. Í Runavík eru teir væl fyri. Spælararnir eru topptrimmaðir eftir væl eydnaðu venjingarleguna í Danmark, og teir eru ótolnir eftir at sleppa í eldin aftur. Í hvusu so er sekstan spælarar kappast um tey fyrstu ellivu plássini hjá NSÍ.

Tá ið HB vitjaði NSÍ fyrr í summar var úrslitið 2–2, og tá ið NSÍ í fjør var í Gundadali var úrslitið 4–0 til HB. Hetta var samstundis størsta tapið hjá NSÍ í fjør. At HB megnaði at fáa øll seks stigini ímóti NSÍ í fjør taldi nógv í samlaðu uppgerðini.

## Átjan kappast

Í HB siga teir seg eisini vera væl fyri. Teir hava so at siga ikki havt summarfrí. Beinanvegin eftir at 10. umfarið í landskappingini var avgreitt, var Europa Cup luttøkan á skránni.

– Allir spælararnir, sum higartil hava roynt seg á besta liðnum, eru tøkir. Kári Nielsen, sum breyt beinið tíðliga í ár, hevur vant við fullari ferð í fleiri vikur. Honum restar dystarvenjing, men tað sær gott út hjá honum. Venjarin hevur tann positiva trupulleikan, at tað eru einir átjan spælarar, sum stríðast um tey ellivu plássini, og í hvussu so er sekstan teirra kunnu vera við til at manna liðið, uttan at styrkin á tí broytist nakað serligt, verður sagt úr HB.

Í útidystinum ímóti Kaunas var Carsten From á beinkinum frá byrjan. Hann hevur annars verið ein av teimum, sum hvørja ferð hevur verið við frá byrjan.



# Tað verður stórt tak á Eiði

**Steypavinnararnir, sum vandu fyri fyrstu ferð í gjárkvøldið eftir finalusigurin á Ólavsøku, rokna við torførari uppgávu, tá ið teir fara at vitja vinmenninar á Eiði**

EB/STREYMUR–B36
*Jóannes Hansen*

Talan er um sannan vinardyst, tá ið oddaliðið í landskappingini og steypavinnarin, B36, í morgin fer norður á Mølina á Eiði. Á EB/Streyma liðnum eru nógvir spælarar, sum fyrr hava roynt seg í B36 – Magni á Lakjuni, Egil á Bø, Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen, Pazek og Piotr Krakowski var venjari í fjør og í fyrraárið, tá ið B36 vann bæði steypakappingina og landskappingina.

Men eingin skal billa sær inn, at teir í EB/Streymi standa við stigunum í hondini, og at teir ætla at rætta B36 tey uttan nakað sum helst.

– Teir hava eitt fínt lið, og eg rokni hesa uppgávuna at vera eina at teimum heilt truplu, sigur veteranurin Jens Kristian Hansen, sum sat uttanfyri og hugdi at, og heilt víst ikki hevur gloymt ta ferðina, tá ið EB/Streymur í øðrum umfari var í Gundadali og vann 3–1 ímóti B36.

B36 hevði bara frí í eina viku, eftir at 10. umfarið í landskappingini var spælt. Í hesi vikuni hava teir havt frí síðani ólavsøkudag. Fyrsta venjingin skuldi vera í gjárkvøldið. Tað hevur ikki verið nakað at hoyrt um skaðar. Tað einasta, sum er púra greitt, er, at Fróði Clementsen verður ikki við. Hann sá reytt í longdu leiktíðini í steypafinaluni og er tískil leikbannaður.

## Pazek aftur komin

Á Eiði siga teir, at tað hevur verið rættuliga hugaligt at vant síðani summarsteðgin. Allir spælararnir, sum vóru við undan summarsteðginum, eru framvegis í felagnum. Pazek, sum í fyrstu umførunum var stinnur miðverji, hevur leingi verið burturfrá, tí hann var skurðviðgjørdur fyri næstan tveimum mánaðum síðani. Í hesi vikuni er hann komin aftur úr Póllandi, har hann er komin fyri seg aftur. Hann hevur vant í Póllandi í tríggjar vikur, men í gjár var ikki greitt, um hann verður við frá byrjan í morgin.

Í fjør endaði tað 1–1 millum EB/Streym og B36 á Mølini. Í fyrra árið var GÍ, sum tá var oddaliðið, í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin í fjør, á Mølini. Teir megnaðu ikki at vinna, og tað var byrjanin til støðuga afturgongd. B36 yvirtók oddasessin og vann FM. Nú fæst at síggja, hvussu tað fer at hilnast hjá B36, sum nú er oddaliðið.

*Hóast B36 er favorittur á Mølini sunnudagin, so kunnu teir ikki taka sær av løttum, tí hvør minnist ikki, at EB/Streymur tók øll av bóli við at vinna 3-1 í Gundadali í øðrum umfarið.*



# Skála hevur ikki tapt á Toftum

**Botnliðið saknar tríggjar spælarar, sum eru leikbannaðir, og hjá B68 er ein av lyklaspælarunum burtur, nú teir skulu royna at lyfta seg nærri toppinum**

B68–SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Skála hevur ongantíð tapt á Svangaskarði. Men so skal beinanvegin leggjast afturat, at teir hava bara eina ferð spælt landskappingardyst í bestu deildini á Toftum. Tað var í síðsta umfarinum í fjør, og ta uppgerðina minnast tey væl – bæði á Skála og á Toftum. Skálamenn spældu fyri lívinum í bestu deildini, og tað eydnaðist teimum at vinna 3–2, og harvið lyftu teir seg upp á áttanda plássið og komu harvið undan øllum hóttanum um niðurflyting.

Nú tað verður farið undir seinna partin av hesum kappingarárinum er setningurin á Skála nett tann sami, sum hann var í fjør. Undan summarsteðginum vunnu skálamenn á heimavølli ímóti FS Vágum, men teir eru aftastir, og tað er ikki frítt, at deymurin av niðurflyting kennist.

Tríggir spælarar eru leikbannaðir á Skála, og tað er ivasamt, um Jónhard Frederiksberg verður førur fyri at spæla. Hann plágast av lærskaða. Hann hevur verið á vøllinum nakrar ferðir síðani summarsteðgin, men hann hevur ikki verið førur fyri at venja saman við hinum. Leikbannaðu spælararnir eru Arnhold Berg, Agnar Højgaard og Julian Floresco.

## Fróði burtur

Um úrslitini í hinum dystunum laga seg væl fyri B68, so hava teir – um teir fáa fult ímóti Skála – møguleika at lyfta seg væl nærri toppinum, enn fjórða plássið, sum teir nú eru á.



Hetta er annars fjórða árið á rað, at B68 er á fjórða plássinum í summarsteðginum.

Einasti spælarin hjá B68, sum ikki hevur møguleika at vera við hesa ferð, er Fróði Benjaminsen. ímóti EB/Streymi fekk hann gult kort, og harvið er hann leikbannaður ímóti Skála.

Tá ið B68 var á Skála í øðrum umfari, vunnu teir 1–0 við brotssparksmáli, sum Dánial Hansen skoraði, eftir at Fróði Benjaminsen var feldur.

*Skal B68 gera seg galdandi í toppinum í ár, so krevt ein sigur á botnliðnum Skála á heimavølli.*